## Ársins vøruvognur



Nýggi VW Transporter er av ábyrgdarblaðstjórum og útgevarum av fremstu yrkistíðarritum í Evropa kosin "Van of the Year 2004". Grundgevingarnar vóru t.d. at Transporter hevur stórt vørurúm, stórar motorar og framúrskarandi koyrieginleikar

*Kelda: Semler Gruppen, tíðindaskriv*

## »Årets bestseller 2003«



Bilpriser.dk hava kosið Hyundai Getz til "Årets Betseller 2003". Millum 20 teir mest seldu bilarnar í Danmark bleiv Hyundai Getz 1,3 valdur sum tann mest økonomiski

*Kelda: bilpriser.dk*

## Suzuki Grand Vitara



Suzuki Grand Vitara verður nú nakað broyttur framman, og XL-7 kemur við einum nýggjum 2,0 litur common-rail turbo dieselmotori frá PSA við 109 hk

*Kelda: Motort Magasinet*





*LVD Convoy verða gjørdir í nógvum ymiskum útgávum. Her sum vøruvognur og sum mini-bussur til 17 persónar*

# Auto Trade umboð fyri LDV

**Fyritøkan Auto Trade í Havn hevur fingið umboð fyri bretsku LDV, sum gera ymiskar smærri lastbilar, minibussar, vøruvognar og aðrar sergjørdar bilar til nógv ymisk endamál**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

LDV Limited er ein sjálvstøðug bilverksmiðja í Birmingham í Onglandi. Verksmiðjan, sum byrjaði at gera LDV bilar í 1993, hevur søguligar røtur aftur til Wolsley Motors og hava verið partur av Morris Motor, British Leyland og DAF Trucks Groups.

Fyrstu tíðina seldu teir bert LDV bilar til heimamarknaðin, men so hvørt sum verksmiðjan er ment og nútímansgjørd er eftirspurningurin vaksin, og nú selja teir bilarnar í fleiri evropeiskum londum. Nú eru teir so eisini komnir til Danmarkar og til Føroyar.

Heilt ókendur er LDV ikki í Føroyum. Í nøkur ár hevur Litaval á Hjalla havt ein LDV kassavogn, sum teir hava brúkt til flutning millum Hoyvík og deildina hjá Litaval á Tvøroyri.

Bilarnir, sum koma hendan vegin, verða Convoy serian hjá LDV. Teir verða gjørdir í nógvum ymiskum útgávum, sum t.d. vøruvognar frá 3,1 til 4,1 tons, sum chassis við last og einkultari ella dupultari kabinu, og sum minibussar til upp til 17 persónar.

Umframt omanfyri nevndu útgávur kunnu teir skaffast í nógvum ymiskum sergjørdum útgávum. SVO er ein deild á LDV-verksmiðjuni, sum umbyggir bilarnar eftir ynski kundans. Tað kann vera alt frá lyftum, dragihurðum, skottryggum glasi, minifongslum til politibilar, ella hvat tað skal vera. Umbyggingarnar vera gjørdar undir framleiðsluni av bilinum í samráð við kundan, soleiðis at sleppast kann undan at broyta ein bil sum annars er liðugt gjørdur.

Bilarnir koma at liggja sera væl í prísi og vera harvið væl kappingarførir við aðrar líknandi bilar á marknaðinum. Sum dømi kunnu vit nevna at ein 3,1 tons vøruvognur, langur við høgum taki, kostar 171.640 kónur u. MVG og ein Minibussur við 17 sitiplássum kostar frá 200.440 krónum u. MVG. Motorurin er ein 2,4 litur 4 syl. turbodiesel við intercoolara. Sum standard eru bilarnir útgjørdur við t.d. ABS bremsuskipan (EBD á øllum úgávunum uttan 3,1 tons), elektroniskari startsperru, sentrallási, el-rútum, el-síðuspeglum við hita, og forsetur sum kann stillast allar vegir.

Danskir motorjournalistar siga, at bilarnir eru sera væl samansettir, og teir eru økonomiskir.

Frá Auto Trade verður sagt, at LDV bilarnir verða handaðir við besta garantiinum á marknaðinum, 4 ár / 250.000 km, og at kostnaðurin av viðlíkahaldi er sera lágur samanborið við aðrar líknandi bilar, 24.000 km / 1 ár millum eftirlitini. Motorarnir hava ikki tannreim men viðlíkahaldsfríða ketu.

Fyrstu LDV-bilarnir væntast einaferð í komandi mánað.



*LDV bilarnir kunnu uppbyggjast eftir egnum ynski. Uppbyggingarnar vera gjørdar í samráð við kundan*






# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**FORD FOCUS STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg 16.maj 2002, Km 41.000. Sera vælhildin - Centrallás- El.Rútar-Hita í forrúti - Hita í Forsetrum - Radio v.bandsp. V.m. Bert 1 ár og 5 mánaðir. Seldur vegna keyp av 7.pers. bili. Kr. 180.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg Mar-97, Km 150.000. Fjarðstýrt centrallás-El.rútar-El-spegl-Spoylara aftan- Alufelgur- v.m. Tilboð uttan bil í býti kr. 56.000. Kr. 66.000.



**PEUGEOT EXPERT 2.0 HDI 8.PERSÓNAR**
Árg Jan-03, Km 12.900. Selist vegna keyp av 4.Hjólstrekkjara. Sum nýggjur: Alufelgur- Eyka vetrarsett-Tónaðar rútar-El rútar-El-spegl-Fj.stýrt centrallás-C.D.Anlegg-Sleipikrók v.m. nýggjur 295.000,-. Kr. 260.000.



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Sera vælhildin Aircondition-Alufelgur-Fjarðstýrt centrallás- El Rútar-El Spegl v.hita. C.D.Anlegg v.m.. Kr. 160.000.



**TOYOTA LANDCRUISER DIESEL**
Árg Maj 1986, Km 136.000. Innregistreraður sum persónvognur. Kr. 28.000.



**HONDA CIVIC**
Árg Sept .2001, Km 20.700. Aircondition - El.rútar - El.spegl v.hita -Radio - Fjarðstýrt centrallás v.m. Sum nýggjur. Kr. 145.000.



**FORD ESCORT 1.8 DIESEL SEDAN**
Árg Okt. 95, Tilboð uttan bil í býti kr. 48.000,- Nýsýnaður. Kr. 60.000.



**KIA K 2700 LASTVOGNUR KING CAB 2700 DIESEL 3.200 KG**
Árg 21. Juni 2001, Km 44.500. Aircondition - Centrallás - C.D.Anlegg - Sleipikrók- Differentiale sperru - eyka tectylviðgjørdur - Klæddur við plátum innv. í lastini. v.m. Nýprísur: 190.300,-. Kr. 115.000.

Pf. D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650



Hyundai Getz kosin "Årets Bestseller"

Millum 20 tey mest seldu bilmodellini í Danmark bleiv Hyundai Getz 1,3 við 5 hurðum valdur sum tann mest økonomiski bilurin at koyra í.
Tað sæst á tænastusíðuni www.bilpriser.dk, sum eisini hevur kosið Hyundai Getz til "Årets Bestseller 2003"




**Bilurin uttan:** Snøggar linjur allan vegin runt! Hyundai Getz fær fólk at venda sær á í ferðsluni.
Eingin ivi er um at Getz er ein fragd fyri eygað og tekur seg væl út í føroyska landslagnum.
Hesin eleganti bilurin rúmar lættliga 4 vaksnum persónum, gott pláss er til beinini og høgt til loftið.
Tú kennir altíð Hyundai Getz aftur í ferðsluni við t.d. síðuspeglunum í sama liti sum bilurin, smartum juvel-baklyktum, og eini útstráling framman sum vísir á ætlanina hjá Hyundai við hjá Getz'inum: **FRAMFÝSNI VIÐ STÍLI!**

HONDA · NORÐBIL · ŠKODA Volkswagen Group · HYUNDAI

BOX 1070 · OYGGJARVEGUR · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 313707 · FAX 310855